# Ársfrágreiðing

# 2012

# fyri  seyðahaldið í Heygshaga

**Hans Martin Andreassen**



Eg byrjaði á B.S.T. tann 25. januar 2012. Tann fyrsta tíðin gekk við at finna útav, hvussu støðan var við seyðinum.

Búnaðarstovan gjørdi í januar 2012 avtalu við Ólav av Steinum, ið gevur B.S.T. fullan avgerðarrætt yvir øllum seyðinum í Heygshaga. Ólavur kemur framyvir at virka sum hjálparmaður hjá H.M.A. Hann fær eina røkt, ið er 5 miðal veðurlomb, 5 miðal gimburlomb og 6 veðragjólingar. Skuldi tað hent, at B.S.T. orsaka av royndarvirksemi kemur at hava meir enn 6, so fella teir til B.S.T. Høvuðsuppgávan hjá Òlavi verður at fóðra og annars fylgja við seyðinum.

Tann 17. februar skannaðu vit ta Sunnastu Gonguna og ein part av Miðjuni.
Ì Sunnastu gonguni vísti skanningin 14 tvílembur, 31 einlembur og 6 geldar harav 5 gjólingar. Tá ið lembingin var av, vóru 16 tvílembur, 28 einlembur og 7 geldar (5 gjólingar og 2 ær), í Sunnastu Gongu.

Skanningin í Miðjuni vísti 7 tvílembur, 17 einlembur og ein var geld. Tá ið lembingin var av, vóru 7 tvílembur, 16 einlembur og ein geld í Miðjuni.

Ì 2013 er ætlanin at skanna allan seyðin í Heygshaga, við tí endamáli at skilja tvílemburnar frá fyri at fáa fóðra tær meira.

**<u>Fóðring: Stráfóður.</u>**
Tað var lítið av kava síðsta vetur, og tí var ikki hildið at neyðugt varð at geva stráfóður. Hetta vísti seg so seinni ikki at verða rætt fyri allan hagan. Tað vísti seg, at tann gamli seyðurin í Ennisgonguni var nógv verri fyri enn hinar báðar gongurnar. Ùrslitið um heystið vísti eisini, at lombini úr Ennisgonguni vóru verri enn í hinum báðum gongunum.
Ùt frá hesum úrsliti er avgjørt at fóðra nakað av stráfóðri tíðliga í vár.

**<u>Fòðring: Seyðafóður.</u>**
Allur seyðurin í haganum varð fóðraður við seyðafóðri. Byrjaðu at geva 14. mars.

**<u>Sunnasta Gonga og Miðjan:</u>**

Frá 14. mars vóru tær Sunnastu inni á bønum sunnanfyri støðina. Tær í miðjuni vóru á bønum frammanfyri støðina. Góvu uml. 280 gr. pr. seyð hvønn dag fram til 29. mars.

Vóru á fjalli og góðu heilivág tann 28. og 29. mars.

Viðgjørdu allan seyðin. Sproytaðu Coromectin fyri orm og lús, Covexin fyri lambablóðsótt og sproytaðu eftir ryggi fyri lús.

Tá ið fjallið var liðugt, vóru tvílemburnar sleptar oman um landsvegin og einlemburnar vórðu verandi á bønum. Tvílemburnar fingu 600 gr. pr. seyð um dagin frá 29. mars til 15. april. Frá 15. april til 20. mai fingu tær 870 gr. pr. seyð um dagin.

Einlemburnar fingu 370 gr. pr. seyð um dagin frá 29. mars til 15. april. Frá 15. april til 20. mai fingu tær 530 gr. pr. seyð um dagin.

Góvust at fóðra tann 20. mai, og róku seyðin av bønum tann 21. og 22. mai.

**Ennisgongan:**

Byrjaðu at fóðra tann 14. mars. Frá 14. mars til 29. mars fingu tær 280 gr. pr. seyð um dagin. Frá 29. mars til 15. apríl 370 gr. Pr. seyð um dagin. Frá 15. april til 29. mai fingu tær 540 gr. pr. seyð um dagin.

**Fjalldagar:**

**Fyrsti fjalldagur:** Tann 17. feb., tá ið vit róku Sunnastu og ein part av Miðjuni til skanning. Róku ærnar inn á støðina og skannaðu tær inni í seyðarúminum.



Mynd. Skanning

Manning: Mourits Sørensen, Maja S. Olsen, Ólavur av Steinum og Hans Martin Andreassen. Raksturin gekst væl.

**Annar fjalldagur:** Tann 28. mars róku vit tær Sunnastu og Miðjuna inn á Støðina. Vigaðu allan seyðin og góvu teimum Sunnastu gulan dropa um hálsin og teimum í Miðjuni orangelittan dropa. Allur seyðurin varð viðgjørdur sum omanfyri nevnt.

Manning: Mourits Sørensen, Maja S. Olsen, Ólavur av Steinum og Hans Martin Andreassen.

**Triðji fjalldagur:** Tann 29. mars róku vit Ennisgonguna oman á støðina, gekk rættuliga væl at reka oman. Tað varð so seint uppá dagin, at vit valdu at lata gonguna standa nátt yvir á støðini. Dagin eftir taldu og skrivaðu vit seyðin upp. Eisini vórðu tær vigaðar og viðgjørdar sum omanfyri nevnt.

Manning: Mourits Sørensen, Maja S. Olsen og Hans Martin Andreassen.

Áðrenn farið var á fjall í áseyðaroyting, gjørdu vit nýggja rætt inni á støðini. Rættin var gjørd úr timburelementum, ið kunnu skrúvast saman. Rættin hevur fimm rúm.

Hon er gjørd við slisku til at skilja seyðin. Riggaði rættuliga væl og menn vóru á einum máli um, at hetta var sera gott.

**Lembing:**

Lembingin í ár byrjaði tann 5. april. Eftir tíðini, ið verðagjólingarnir vórðu sleptir út, skuldi tað ikki lembt fyrrenn uml. 25 apríl. Síðst í apríl var hálvlembt. Tað gingu fleiri veðurlomb úti aftaná fjall síðsta heyst (2011). Hetta gjørdi, at lembingin byrjaði alt ov tíðliga. Veðrið í lembingini var gott her hjá okkum. Eingi lomb doyðu orsaka av veðri. Ein ær fekk mjólkafepur. Hon varð sproyta tvær ferðir, men doyði. Lambadeyðin var lítil. Eitt lamb var deyðlembt, tvey fann eg deyð í haganum, og eitt var yvirkoyrt niðri í rundkoyringini. Ein stórur trupulleiki í lembingini var, at ærnar fóru heilt oman á gamla bøin niðri á Heyggi. Í Ennisgonguni mistu vit eini 3 til 4 lomb í lembingini. Samanumtikið ein rímiliga væleydnað lembing.

**Fjórði fjalldagur:** Tann 3. juli varð farið í áseyðaroyting. Róku ta Sunnastu gonguna og Miðjuna í einum. Av tí at hetta var fyrstu ferð, roynt var at reka inn á støðina í royting, vóru menn ikki sørt spentir uppá, um hetta mundi fara at hepnast. Raksturin gekk nógv betur, enn eg hevði droymt um.



Mynd. Nýggja rættin

Ein ær var úti, og einki lamb slapp undir rakstri. Sera væleydnað.

Royttu allan tann gamla seyðin umframt 60 lomb (roynd at klippa lombum). Allar ærnar vóru vigaðar og lombini eisini.

Manning : Ólavur av Steinum, Dánjal Petur Müller, Zacharias Jakobsen, Heri Müller, Bartal Andreassen, Edvard Petersen, Jens Ivan í Gerðinum, Maja S. Olsen, Mourits Sørensen og Hans Martin Andreassen.

**Fimti fjalldagur:** Tann 5. juli áseyðaroyting í Ennisgonguni.

Manning: Ólavur av Steinum, Edvard Petersen, Zacharias Jakobsen, Jens Ivan í Gerðinum, Ari Jóhannesson, Bartal Andreassen, Mourits Sørensen og Hans Martin Andreassen. Jóannes Debess á Oyrareingjum var í samgongu.

**Sætti fjalldagur:** Tann 18. septembur 2012 í skurðfjall Sunnasta Gonga og Miðjan.

Manning: Ólavur av Steinum, Ari Jóhannesson, Zacharias Jakobsen, Bartal Andreassen, Dánjal Petur Müller, Jóannes Arge, Maja S. Olsen, Edvard Petersen, Mourits Sørensen og Hans Martin Andreassen. Jóannes Debess var við í samgongu.

**Sjeyndi fjalldagur:** Tann 20. septembur í skurðfjall Ennisgongan.

Lækkaðu áseyðatalið úr 197 til 187. Tóku 9 lítil gimburlomb úr Ennisgonguni til hundatrening.

Manning: Ólavur av Steinum , Jóannes Arge, Zacharias Jakobsen, Bartal Andreassen, Dánjal Petur Müller, Edvard Petersen, Mourits Sørensen og Hans Martin Andreassen. Jákup Hanusson í Leynum var í samgongu.

**<u>Ærsvekt Miðjan og Sunnasta Gonga:</u>**

Á medisinfjalli tann 29.03 var miðalvektin 41,25kg.

Í áseyðaroyting tann 03.07 var miðalvektin 45,21 kg.

Í skurðfjalli tann 18.09 var miðalvektin 55,33 kg.

**<u>Ennisgongan:</u>**

Ikki vigað á medisinfjallinum.

Í áseyðaroyting tann 05.07 var miðalvektin 42,42 kg.

Í skurðfjalli tann 20.09 var miðalvektin 49,80 kg.

**<u>Lambsvektir:</u>**

Í lembing var miðalvektin av Sunnastu G. og Mið. 3544 gr.

Lambsvektin av Ennisgonguni varð ikki skrásett í ár.

**<u>Sunnasta Gonga og Miðjan:</u>**

Í áseyðaroyting tann 03.07 var miðalvektin 21,34 kg.

Í skurðfjalli tann 18.09 var miðalvektin 40,79 kg. Alt íroknað.

Livandi vekt av lombunum, ið dripin vórðu, var 41,22 kg.

Flett vekt av lombum 31,73 pund.

Flett vekt var 38,49% av livandi vekt.

**<u>Ennisgongan:</u>**

Ì royting tann 05.07 var miðalvektin 20,28 kg.

Ì skurðfjalli tann 20.09 var miðalvektin 36,27 kg alt íroknað.

Livandi vekt av lombunum, ið dripin vóru, var 37,56 kg.

Flett vekt av lombum 30,53 pund.

Flett vekt var 40,64% av livandi vekt.

Av tíð at 9 tey smæstu gimburlombini vóru tikin til hundalomb, er miðalvektin (flett vekt) úr Ennisgonguni eitt sindur hægri, enn hon eigur at vera.

**Royndir at royta lomb í áseyðaroyting:**

25 veðurlomb, ið vórðu roytt, vigaðu 842 pund, miðalvekt á 33,68 pund.

25 veðurlomb óroytt vigaðu 832 pund, miðalvekt á 33,28 pund.

Tey royttu høvdu eina miðalvekt, ið var 400 gr. hægri enn tey óroyttu.

12 gimburlomb, ið vóru roytt, vigaðu 329 pund, miðalvekt á 27,41 pund.

12 gimburlomb óroytt vigaðu 328 pund, miðalvekt á 27,33 pund.

25 veðurlomb +12 gimburlomb, ið vóru roytt, høvdu eina miðalvekt á 31,65 pund.

25 veðurlomb + 12 gimburlomb óroytt høvdu eina miðalvekt 31,35 pund.

Tey royttu veðurlombini + gimburlombini høvdu eina miðalvekt, ið var 300 gr. hægri.

**Roynd við lombum á bønum frá 19. sept.**

Tann 19. sept. vigaðu vit 17 veðurlomb (samlað vekt 811 kg/miðal 47,71 kg).

Tey vórðu síðan slept oman um landsvegin og gingu har til tann 25.okt.

Tann 25. okt vóru hesi lomb vigaði aftur,og høvdu tey tá eina vekt, ið sá soleiðis

út. (samlað vekt 798 kg/miðal 46,94 kg). Hetta vísti, at hesi lombini vóru 13 kg léttari, enn tá ið tey fóru út á bøin.

Seks av hesum lombum vórðu uppgjørd til veðragjóling, og hini 11 vóru flett.

Miðalvektin av teimum, ið flett vóru, var 38,09 pund. Flett vekt var 41,36% av livandi vekt.

**Tvílembulombini:**

Av tvílembulombunum vóru 26 av teimum, ið hoyrdu til tað Sunnastu gonguna, dripin. Hesi vóru øll skrásett og høvdu eina miðalvekt uppá 28,69 pund. Tað besta vigaði 36 pund og tað ringasta 19 pund.

Ì øllum haganum lembdu 34 ær 2 lomb.

**Fletting:**

Vit flettu allan seyðin á Støðini. Manningin var Bergur Lützen – Øssur Andreassen – Hallur Sørensen – Allan Bjarnason - Jóannes Arge – Jóannes Mikkelsen.

Frá B.S.T. vóru Mourits Sørensen, Edvard Petersen, Hans Martin Andreassen og Maja S. Olsen.

Flettu 54 lomb tann 19. sept. - 72 lomb tann 21. sept. - 24. sept 43 ær og eitt lamb.

Tann seyðurin, ið gekk niðanfyri vegin, flettu vit sjálvir.

**Bruttoúrtøka:**

43 ær flettar, 1907 pund, gevur eina miðalvekt á 44,34 pund.

6 hundalomb 233 pund, gevur eina miðalvekt á 38,83 pund.

Sunnasta/Miðjan, 106 lomb, 3363 pund, gevur eina miðalvekt á 31,73 pund.

Ennisgongan, 51 lomb, 1557 pund, gevur eina miðalvekt á 30,53 pund.

Um øll lombini vóru seld fyri 70 kr. pr. kg., hundalombini fyri 70 kr.pr.kg.,

og ærnar fyri 58 kr. pr. kg., hevði úrslitið verið hetta:

| | |
|---|---|
| Samla vekt lomb 4920 pund x 35 kr. pundið = | 172200,00 kr. |
| Vekt hundalomb 233 pund x 35 kr. pundið = | 8155,00 kr. |
| Vekt ær 1907 pund x 29kr.pundið= | 55303,00 kr. |
| **Í alt** | **235.658,00kr.** |

**Verðagjólingar:**

Sleptu verðagjólingunum út tann 29. novembur. Tveir til Sunnastu/Miðjuna og tveir til Ennisgonguna. Ein var til ærnar, ið vóru inni, og ein til ærnar, ið gingu á bønum (roynd við fóðring í brundtíð). Aftaná 10 dagar fingu vit tveir verðagjólingar aftrat og skiftu teir um við tann, ið var inni og tann á bønum.

**Royndir við seyði**

Vit hava gjørt hesar skrásetingar og seyðaroyndir í 2012: (Nøkur úrslit eru við her. Nágreiniligari úrslit verða kunngjørd á heimasíðuni)

- Skanna ærnar

- Vekt á lombum í lembing, í áseyðaroyting og um heystið
- Vekt á óm í medisinfjalli, í áseyðaroyting og um heystið
- Fóðring áðrenn brundtíð (flushing)
- Roynd at royta lomb
- Lomb á bønum um heystið
- Vigað tálgina í nøkrum lombum
- Kanna og skrásett litin á krovunum í hjallinum



Mynd. Veðurlambskrov